Løgmaður um víðkan av samgongu:

Eiga ikki at útiloka at fáa Javnaðarflokkin við

Løgmaður um at fáa Javnaðarflokkin við í samgongu seinni: - Tann møguleikan skal man avgjørt ikki útiloka. Í politikki er tað soleiðis, at man má altíð vera opin fyri teimum møguleikum, sum vísa seg

- Verður hugt framéftir, og tað skulu takast týðandi avgerðir fyri Føroya land - og tað skulu tað í komandi tíðum á nógvum økjum - og um man har følir, at tann politiska skipanin hevur brúk fyri størri stabiliteti og undirtøku millum fólk, kann tað avgjørt vera ein møguleiki at víðka um tað parlamentariska grundarlagið við eitt nú Javnaðarflokkinum

POLITIKKUR
Jan Müller

Løgmaður hevur leingi tosað um at fáa Javnaðarflokkin við í eina breiða samgongu. Av ymsum orsøkum eydnaðist tað ikki. Men nú hann hevur fingið eina smæla 17 manna samgongu, hvørs samgonguskjal Javnaðarflokkurin í stóran mun sigur seg kunna góðtaka, spurdu vit løgmann, hví hann, tá avtornaði, ikki víðkaði samgongugrundarlagið til eisini at fevna um Javnaðarflokkin!

- Tað er sjálvandi eitt sjónarmið, sum ein saktans kann koma við. Men tað er eingin loyna, at tað er trupult, tá tú er komin so langt í eini samráðing. Hvat kann vísa seg fram eftir skal eg avgjørt ikki lata eyguni aftur fyri. Sjálvt um henda samgongan er skipað, so eigur tað ikki at vera ómøguligt at hava eitt opið sinni fyri hasum møguleikanum, serstakliga um man vísir í verki, at semja er um tann politikk, sum er settur út í kortið.

- Meinar tú harvið, at tað ikki er óhugsandi, at samgongan kann verða víðkað við Javnaðarflokkinum í hesum valskeiðnum?

- Tann møguleikan skal man avgjørt ikki útiloka. Í politikki er tað soleiðis, at man má altíð vera opin fyri teimum møguleikum, sum vísa seg.

- Skal hetta skiljast soleiðis, at fer Javnaðarflokkurin at "skikka sær væl" og reka konstruktivan politikk í andstøðu, so er tað ikki óhugsandi, at flokkurin fær tilboð at koma við í samgonguna?

- Nú skal man ansa eftir ikki at fara út sum skúlalærarin við peikifingurin og siga, at skikka tit tykkum væl, so skulu tit fáa bomm. Soleiðis fungerar tað ikki. Men tað er klárt, at um man hyggur frameftir og tað skulu takast avgerandi støður fyri Føroya land - og tað skulu tað í komandi tíðum á nógvum økjum - og um man har følir, at tann politiska skipanin hevur brúk fyri størri stabiliteti og undirtøku millum fólk, tá kann tað avgjørt vera ein møguleiki at víðka um tað parlamentariska grundarlagið á ein slíkan hátt. Tað er eingin ivi um tað sigur løgmaður og heldur fram:

- Vit eiga at fokusera sum mest uppá politiska arbeiðið og lat okkum eisini frá samgonguni syrgja fyri at vísa á, at vit eru førir fyri at leggja so til rættis, at eisini andstøðan følir, at hon hevur eina missión, eina ábyrgd og ávirkan. Tvs. at man motiverar á hesum øki og tekur alt spektrið við. Tað er so sanniliga eisini ein stór avbjóðing fyri okkum, sum sita í landsstýrinum.

Lesið eisini s. 16, 17, 18 19 og 30

Elduvík ella Timbuktu?

Ása undir Kletti

»Hey mamma, vit fara námsferð í januar mánað« - so er stilt eina løtu - »Vit fara til Kypros«!

Dóttirin er so findarglað - andlitið lýsir, og hon hyggur við sínum milda eygnabrá uppá mammu sína, sum stendur eitt sindur foy og sodnar upplýsingina.

Orðingin »serligur tørvur« kemur fram fyri meg - havi hoyrt frá mongum strongdum mammum um hetta løgna nýggja fyribridgið millum ungdómar, sum ganga í skúla - ungdómurin hevur "serligan tørv". Síðani nær? Hvør hevur stungið út í kortið, at okkara spillfríski, aerobikkhoppandi, "steppandi" og »spinnandi« (helt í fyrstani, at dóttirin var farin at ganga til ullarvirking, inntil eg lærdi, at tað at spinna í dag merkir at súkkla!) ungdómur afturat øllum tí, íð vanligi dagurin hevur við sær, nú eisini hevur henda »serliga tørvin«? Tørvin, sum í roynd og veru á góðum føroyskum máli eitur at ferðast út um landoddarnar? Foreldrini? Neyvan! (Og hvør tímir til Elduvíkar, tá hin møguleikin eitur Timbuktu?) »Harra Gud - barnið má sleppa avstað, tí øll hini í flokkinum fara«! Bert tú kenslu á hetta, kæri lesari, so les meira.

»Vit fara at hava køkutombola, og vit fara eisini at selja lutaseðlar, so tað fer ikki at kosta tykkum eitt oyra«, leggur hon errin afturat. Kanska havi eg tá sæð eitt sindur troytt út, og hon hevur roynt at sagt okkurt, sum kann fáa meg at dansa krígsdans av berari gleði hennara vegna. Tað er so sum so við krígsdansinum. Havi hoyrt hasa søguna fyrr. Illa tími eg at baka - dugi heldur ikki nakað serliga væl hetta, sum »ein ordilig mamma eigur at duga blundandi«. Tankarnir sveima til Øtker og Maizena, sum gera liðug køkubland, har tað so freistandi stendur »tilsæt kun vand«. Nei, tað fer ikki at bera til á hesum sinni. Her má brettast upp um armar og eltast og rørast, so ikki eitt eyga er turt. Heldur ikki kann eg snúgva mær undan við at baka »hina brúnu skuffukøkuna, tit vita«, sum bert tekur 5 min. at blanda saman og 25 min. at baka, sum kann skerast í fýra partar og pyntast, so tað sær út sum um eg havi staðið í køkinum og bakað og pyntað við alskyns átuligum silvur- og gullkúlum og krúmmli í tímavís. (Nú mundi eg mist ondina.)

Kypros! Á ja, góði lesari - nú hugsar tú kanska, at eg sum í einum skjótum filmi síggi allar freistingarnar á Kypros, sum lítla elskuliga og ljóshærda dótturin kann koma sær útí á ferðini - ikki minst teir brúnoygdu væl trimmaðu sjokulátabrúnu sjeikarnar, sum væntandi fara at sveima rundan um hana sum biur um hunang, nei, nei - eg síggi okkurt sjokulátabrúnt, men tað er í formum: Brúnakøkur, keksakøkur, rullukøkur, skuffukøkur, pleskur, »mormors marmorkage«´, marengsbotnar (við rómapakka og abrikoskompotti), muffins, smákøkur, bollar við rosinum, bollar við ongum rosinum, bollar við glasuri o.s.fr. og ikki um at tala steikiposar (tað er tann bíligara og einfaldara loysnin, sigst) pyntiband, pappeskjur, køkukoyring, bering inn, bering útaftur, tí sjálvandi fer alt húskið av húsum og stuðlar einum slíkum tiltaki. Alt annað hevði verið skomm!

Komin á staðið kenni eg tað, sum eg onkursvegna verið lumpað - ella kanska lati eg meg lumpa, tí áðrenn eg veit av, standi eg við fullum føvningi av brúnakøkum, keksakøkum, rullukøkum, skuffukøkum, pleskum, »mormors marmorkage«, marengsbotnum, muffins, smákøkum, bollum við rosinum, bollum við ongum rosinum, bollum við glasuri, sum onkur hevur bakað við sveittabroti til »námsferðina, sum einki skuldi kosta«. Komin heimaftur er aftur avtaglað við køkum á køksborðinum! Tann einasti munurin millum nú og í morgun er, at onkur onnur strongd og ørkymlað mamma hevur bakað hesar!

Lutaseðlarinr, sum eru partur av figgingini til dreymaferðina, eru ein søga fyri seg. »Eg skal bara selja 100 lutaseðlar«, sigur dótturin við stórum eygum. Tíðin gongur og seðlarnir liggja í køkinum. Teir liggja og liggja - løgið, men eg haldi ikki, at bunkin er minkaður nakað serligt, tá komið er inn í seinasta mánaðin, áðrenn fráferðina til Kypros. Hvussu er og ikki, so tekur pápin synd í dóttrini - einki skal hon út at banka uppá hjá grannum og selja lutaseðlar - tað skal eingin siga um dóttur hansara! Hann hevur sanniliga ráð at lata hana fara til Kypros uttan stuðul. Endin er, at babba keypir mesta partin av bunkanum, og so er sloppið.

Var og vitjaði í svimjingarhylinum ein leygarmorgun herfyri. Hoyrdi eina mammu nevna, at hon mátti skunda sær, tí hon skuldi avlevera 30 nýbakaðar køkur (upp kl. 06.00 og í fyriklæðið) til eitt køkutombola í skúlanum, men fyrst mátti hon í peningasjálvtøkuna. Sjálvandi mátti hon hava fitt av peningi við, so hon kundi keypa lutaseðlar, sjálvt um hon - júst henda leygardagin - hevði allarbestan hug at fara í urtagarðin, tí sólin skein oman og niðan.

Ella kanska hevði hon ætlanir um at fara til handils at keypa sær sjálvari okkurt (endiliga) - kanska einar nýggjar skógvar ella okkurt lekkurt smyrsl. Men gakk. Skógvar og smyrsl bíða til eina aðru ferð, sum ógvuliga sannlíkt gerst »onga« aðru ferð. Smyrsltuban verður kroyst til seinasta blóðsdropa (tað er ótrúligt, so langt tuban kann røkka, um tú veruliga leggur í) og gomlu skógvarnir verða sendir til skómakara eina ferð afturat.

Veit, at vit eru óteljandi foreldur, sum millum ár og dag hava fingið einsljóðandi boð um námsferðir til Kina, Kypros, Barselona, London, Tansania, Tunis, Timbuktu, Irkutsk og onnur eksotisk stað, sum fleiri ikki hava ráð ella stundir at vitja - ella enntá ikki hava hoyrt um áður.

Er ikki stundin komin, har vit taka støðu og kalla ein spaka fyri eina spaka, ístaðin fyri at gykla at námsferðin einki kostar? Eru lutaseðlarnir og køkurnar ikki tað bera hjáputur?

Velji ikki at nerta við sera eyma spurningin um lummapening - fari at lata lesaran sjálvan dvølja við »ódjórið«. Bert hugflogið setir mark - 500 kr. - 5000 kr. 10.000 kr. Eingin hægri?

Óivað ganga fleiri foreldur og mutla fyri seg sjálvi: "Næsta ár í Jerusalem". Á ja. Kanska gerst ætlaði familjutúrurin veruleiki næsta ár ella næsta ár ella…….

Farvæl Danland og Norrøna, farvæl Tivoli - farvæl kampingtúrurin við Atlantic Airways til Nairn í Skotlandi - farvæl, farvæl.

Eg vil verða løgreglumaður

Næmingarnir í 7. flokki í skúlanum við Løkjuna á Viðareiði, hava verið í starvsroynd í 3 dagar. Endamálið er ein verkætlan, sum skal gera næmingarnar meiri tilvitaðar um, hvat krevst fyri, at dreymurin um lívstarv kann gerast veruleiki.

VERKÆTLAN
Rúna Sivertsen

- Fróði sá út til at stórtrívast saman við makkara sínum, Elsebeth. Fróði var »heppin«, tí mánakvøldið, sum annars plagar at vera eitt friðarligt kvøld, hevði løgreglan úr at gera.

- Um tú skalt koma víðari, er neyðugt við góðum úrslitum, tí samfelagið krevur so nógv í dag.

Soleiðis sigur 1. lærari á Viðareiði, Heidi Vágsá, sum í løtuni avloysir Anitu Køtlum Petersen, sum er í farloyvi.

- Børn og ung hava oftast ein dreym um, hvat tey ætla at »verða«, men ikki eina veruliga fatan av, hvat hetta krevur av teimum, sigur Heidi.

Heidi heldur, at tað torført hjá teimum ungu, sum skulu í starvsroynd, at vita, hvat tey skulu velja, tí útboðið er so stórt. Tí er gott við eini slíkari verkætlan í 7. flokki. Hesir tríggir dagarnir, tey hava verið úti, fara at gera tað lættari hjá teimum at velja, hvar tey skulu í starvsroynd í 9. flokki, sigur hon.

- Vit vóna, at tey fara at velja eitt starvsroyndarpláss, sum veruliga kann geva teimum nakað, heldur enn at ganga eftir peningi, sum summi starvspláss eru kend fyri at geva, sigur Heidi.

Eftir at teir 9 næmingarnir, sum ganga í 7. flokki á Viðareiði, hava verið tríggjar dagar í starvsroynd, eru tey vorðin greið yvir, hvat tað krevur, skalt tú blíva til nakað. Tey skuldu velja starv ella fyritøku, sum tey sjálvi kundu hugsað sær til framtíðarstarv. Teir tríggir dagarnir skuldu nýtast til at seta seg væl inn í, hvat krevst fyri t.d. at gerast løgreglumaður, arkitektur ella sjálvstøðugur vinnurekandi.

Ert tú ov feitur, fært tú ikki fast starv

Tá vit vóru og vitjaðu á Politistøðini í Klaksvík, har Fróði var í starvsroynd, fingu vit at vita, at skalt tú hugsa um fast starv sum løgreglumaður, mást tú sannliga eisini ansa vektini.

Fróði var »heppin«, tí mánakvøldið, sum annars plagar at vera eitt friðarligt kvøld, hevði løgreglan úr at gera. Í herviliga summarstorminum hetta kvøldið, koppaði ein trailari, eldur var í einum húsum, og onkustaðni mátti løgreglan út at fáa frið í lag.

Hans Jákup, sum var hjá Fuglø Arkitektum, fekk seg sanniliga royndan. Hann fekk eina bundna uppgávu at tekna eini summarhús til eina familju við tveimum børnum. Teir tríggir dagarnir rukku sjálvsagt ikki til hesa uppgávu, ið er ætlað teimum, sum koma í 14 daga starvsroynd. Men Hans Jákup fekk at síggja, at tað skal meira til, enn at duga at tekna, vilt tú gerast arkitektur.

Henda dagin vit vóru og vitjaðu skúlan við Løkjuna á Viðareiði, sótu næmingarnir so hugagóðir og arbeiddu við verkætlanini.

Øll tætt knýtt, til »gott og ilt«

Skúlin á Viðareiði er ein av teimum smáu skúlunum. Har starvast 6 lærarar, og næmingarnir eru 54 í tali.

Heidi sigur, at tað eru bæði fyrimunir og vansar við einum lítlum skúla.

- Her eru øll tætt knýtt at hvørjum øðrum, bæði næmingar, foreldur og lærarar.

Fyri nøkrum árum síðani kom ynski fram um at fáa framhaldsdeild á Viðareiði. Men sum er, er skúlin ov lítil til tað. Tað eru vist fleiri meiningar um, hvat er rættast og best, men øll eru samd um, at farleiðin til Klaksvíkar er vandamikil um veturin.

Skúlagond byrjaði á Viðareiði um 1837, og varð fyrsti skúlin bygdur í 1885. Eina øld eftir, í 1985, varð byrjað uppá nýggja skúlan - skúlan við Løkjuna á Viðareiði.

- Í hesum húsinum byrjaði skúlagongd á Viðareiði. Í eini frágreiðing frá 1838 stendur: »Skolens Tilstand er upaaklagelig, og har jeg herom intet at anmærke. Det so mangler er en følge av er slet Locale og denne anke vil bortfalde, da en Skole er under bygning« (Sitat úr bóklingi eftir Andreas Justesen: »Eitt sindur um Viðareiðis skúla«)

- Tað liggur væl fyri hjá 13 ára gomlu Hansu av Viðareiði. Hansa er fryntlig og hevur tað sum skal til.